# Til læraran




Marjun Syderbø Kjelnæs

Skriva í sandin

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2010

Rannvá Hansen 2023

## Um bókina

Marjun Syderbø Kjelnæs hevur skrivað bókina *Skriva í sandin*, sum kom út í 2010. Høgni Egholm Magnussen hevur gjørt permuna.

Bókin snýr seg um tíggju ung fólk, gentur og dreingir, sum eru millum 16 og 21 ár, og vit fylgja teimum eitt vikuskifti í Havn. Kapitlarnir hava hvør sín høvuðspersón. Høvuðspersónarnir eru við sum eykapersónar í øðrum kapitlum. Skaldsøgan viðger nógv ymisk evni, m.a. forelskilsi, vinalag, etingarólag, happing, misnýtslu og sambandið millum børn og vaksin.

Skaldsøgan *Skriva í sandin* er umsett til fleiri onnur mál, m.a. danskt, norskt og franskt.

## Um rithøvundin

Marjun Syderbø Kjelnæs er født í Havn í 1974. Hon tók studentsprógv í 1993 og varð útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur í 1998. Marjun hevur skrivað nógv, bæði yrkingar, stuttsøgur, skaldsøgur og útvarpsleikir. Høvuðsevnið í skaldskapinum snýr seg um tær undranarverdu treytir, vit menniskju liva undir. Tað, sum hugtekur hana mest, er tríeindin: skilið, kenslan og trongdin.

Marjun Syderbø Kjelnæs hevur vunnið fleiri skrivikappingar; hon er tilnevnd og hevur móttikið fleiri heiðurslønir, bæði í Føroyum og uttanlands. Marjun hevur fingið starvsløn frá Mentanargrunni Landsins, m.a. fekk hon 3 ára starvsløn í 2009 og eitt ára starvsløn í 2018. *Skriva í sandin* er tilnevnd fleiri norðurlendskar virðislønir.



©Nám

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar til *Skriva í sandin* eru gjørdar til næmingar í 9. flokki. Uppgávurnar eru ætlaðar sum einstaklingauppgávur og eru bygdar upp eftir leistinum *áðrenn tú lesur, meðan tú lesur* og *tá ið tú hevur lisið.*

Verður skaldsøgan lisin upp í skúlanum og arbeitt verður við uppgávunum so hvørt, tekur hetta umleið 20 tímar. Næmingarnir kunnu lata uppgávuna inn, og hon kann telja sum eitt skrivligt avrik.

## Førleikamál

Uppgávurnar og arbeiðshátturin nema serliga við hesi førleikamál úr námsætlanini.

- *at orða seg málsliga rætt, greitt, neyvt og fjølbroytt, bæði skrivliga og munnliga*
- *at greina, tulka og seta í frásjón ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*
- *at skriva tekst sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðalag*
- *at nýta viðkomandi lesisnildir eftir lesiendamáli*
- *at vísa til og endurgeva keldur á rættan hátt*
- *at nýta viðkomandi framløguhættir eftir evni og endamáli*

## Áðrenn tú lesur

Áðrenn næmingarnir fara at svara fyrstu spurningunum ber til í felag í flokkinum at tosa um, hvat sæst á permuni.

Næmingarnir svara síðan hvør í sínum lagi spurningunum og at enda leita teir á netinum eftir upplýsingum um ymiskt, sum Marjun Syderbø Kjelnæs hevur skrivað og vunnið.


©Nám

# Meðan tú lesur

### Persónsyvirlit

Næmingarnir skriva í yvirlitið, so hvørt teir hava lisið ein kapittul. Dømi: Erla – Bjørt: vinkonur.

### Kapitlar í tíðarlinju

Næmingarnir skriva, nær kapittulin byrjar og endar, so hvørt teir hava lisið kapitlarnar. Byrjar kapittulin t.d. fríggjakvøld ella leygarmorgun, og endar hann sunnudag seinnapart ella sunnukvøld. Um ávís klokkutíð verður upplýst, so skriva teir tað niður.

### Evni í skaldsøguni

Næmingarnir fara í bólkar, og hvør bólkur velur sær eitt evni og skrivar síðutøl og notat, tá ið evnið verður umrøtt í skaldsøguni. Næmingarnir hava ikki lisið bókina, og tí er neyðugt at lærarin vísir teimum á møguligu evnini, sum eru í bókini.

### Spurningar til kapitlarnar

Næmingarnir svara spurningunum, so hvørt sum kapitlarnir verða lisnir.

# Tá ið tú hevur lisið

Tá ið øll skaldsøgan er lisin, svara næmingarnir nøkrum fáum spurningum afturat og greiða frá, hvat teir halda um bókina. Síðan arbeiða teir í bólkum við uppgávuni við ymiskum evnum, har teir skrivaðu notat, meðan lisið var.

Undirvísingargongdin endar við, at næmingarnir greiða flokkinum frá tí kapitlinum, sum teimum dámar best, og hví teimum dámdar júst tann kapittulin best.



©Nám